## The Reverends í TUTLhandlinum

Nú verður høvið at hoyra føroyska útiseta countrybólkin The Reverends í TUTLhandlinum á Káta Horninum í Havn. Tað var seint í summar, at teir góvu sína fyrstu fløgu »When you're done« út. Fløgan hevur fingið sera góð ummæli og hevur verið nógv at hoyra í loftmiðlunum. Konsertferðin byjar í TUTLhandlinum fríggjadagin klokkan 16.30. - Konsertin er ókeypis og vit bjóða kaffi og okkurt gott, siga tey í Tutlhandlinum, sum heilsa øllum vælkomnum. Sum nakað nýtt fara tey hvørja viku at senda út topp 10 yvir mest seldar fløgur í handlinum á Káta Horninum.



## Sjúklingar til Íslands

Ein grønlendsk sendinevnd, sum hevur vitjað íslendska heilsuverkið, er so væl nøgd við vitjanina, at hon hevur gjørt av at víðka verandi avtalu um samstarv á heilsuøkinum. Annh Birkekær Kjeldsen, aðalstjóri í grønlendska heilsumálaráðnum, sigur við KNR, at næsta ár fer grønlendska heilsuverkið at senda akuttar sjúklingar til Íslands til viðgerðar. Í fyrsta umfari verður talan um 70 sjúklingar um árið. Harumframt ætla londini eisini at lata starvsfólk í heilsuverkinum arbeiða hjá hvør øðrum stytri tíðarskeið.

# Russar lupu frá avtalu

**Meiningin var, at sektaruppskot skuldi koma til Skálaberg á middegi í dag, men enn eru russar ikki komnir við nøkrum. – Nú vita vit aftur onki, sigur Hanus Hansen**

**SKÁLABERG**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Enn er onki nýtt komið frá eystfrontinum, so Skálaberg flaggar neyvan í dag*

Í samfullar 18 dagar hevur Skálaberg ligið á reduni í Murmansk undir illgruna fyri millum annað at hava veitt 617 tons ólógliga, tí skipið hevur veitt av kvotuni hjá Sundabergi, sum fyrr í ár varð seldur til Russlands.

Boð vóru farin til Russlands, at Skálaberg nú veiðir av kvotuni hjá Sundabergi, men starvsfólki í Russlandi hevði skift starv, og tí vóru boðini ongantíð komin fram.

Hanus Hansen, reiðari, hevur saman við føroyskum myndugleikum boðað frá, at sektaruppskot skuldi koma frá russum á eina fimm milliónir, sum svarar til virðið á teimum 617 tonsunum á middegi í dag. Men enn er onki komið.

– Vit roknaðu við, at tað fór at koma, men enn er onki komið. Nú vita vit aftur onki, men eg vóni, at okkurt hendir í dag, sigur Hanus Hansen, reiðari.

Hann leggur afturat, at kemur ongin loysn í dag, so verða 28 av monnunum settir í eitt flogfar heim til Føroyar.

Umframt ákæruna at hava veitt av kvotuni hjá Sundabergi ólógliga, so vóru aðrar ákærur, at skipið bert hevði avrit av fiskiloyvi, og at skiparin umborð ikki stóð í skjølunum hjá russum.

Hesi bæði seinnu hevur reiðaríið í Føroyum gingið við til, hóast teir hildu tað vera undarligt at ákæru um skiparan skuldu vera, tí tað hevur ongantíð verið ein trupulleiki fyrr.

### Fingu loyvi

JFK, sum er reiðaríið hjá Skálabergi, hevur fingið boð frá føroyskum myndugleikum, at Skálaberg kann veiða av kvotuni hjá Sundabergi, men tað er JFK, sum skal rinda peningin til russar fyri at skipið hevur veitt kvotuna hjá Sundabergi.

Rógvi Reinert, aðalstjóri í Fiskimálaráðnum, váttar, at reiðaríið hevur fingið loyvi at veiða av kvotuni hjá Sundabergi, men vil ikki fara nærri inn á, um Fiskimálaráðið hevur gjørt eitt mistak.

– Vit hava í 32 ár havt eitt fyrimyndarligt samstarv við russar eftir lítið formellum skipanum. Vit kunnu ikki gera nakra niðurstøðu um mistøk í hesum máli enn. Hetta málið er serstakt, og hevur onki fyridømi, sum vit hava funnið fram til, sigur aðalstjórin.

Tí er greitt, at okkurt slag av eftirspæli verður av hesum máli, sum Fiskimálaráðið heldur vera serligt, og sum enn ikki er endaliga avgreitt.

# Kristina á Reynatúgvu aftur Barnaverndarleiðari

**Kona fyrrverandi borgarstjórans á Sandi, Páll á Reynatúgvu, er nú aftur leiðari fyri Barnaverndartænastuna í Sandoy**

**STARV**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tá ákoyringarnar koyrdu upp á tað harðasta ímóti Párli á Reynatúgvu, táverandi borgarstjóra á Sandi, gjørdi kona hansara, Kristina á Reynatúgvu, av, at hon ikki vildi vera leiðari fyri barnaverndartænastuna í Sandoy, tí ivi varð sáddur um hennara starvssetan.

Orsøkin til ivan var, at nógv bendi á, at borgarstjórin var við í starvssetanini av síni egnu konu til leiðara fyri Barnaverndartænastuna í Sandoy.

Stutt eftir, at Kristina á Reynatúgvu segði seg úr starvi, legði Páll á Reynatúgvu frá sær sum borgarstjóri.

Hetta var samstundis, sum spurningur um gegni hjá borgarstjóranum í starvssetanini av konuni var inni hjá Almannamálaráðnum.

### Var gegnigur

Tá niðurstøðan hjá ráðnum kom, var hon greið. Páll á Reynatúgvu var ikki ógegnigur, tá Kristina á Reynatúgvu varð sett í starv, tí hann hevði ikki verið við til samrøður og fundir, sum høvdu beinleiðis ávirkan á starvið.

Um vikuskiftið skrivaði Sandoyarportalurin, at tað fyri kortum varð søkt eftir leiðara fyri Barnaverndartænastuna í Sandoy, og at Kristina á Reynatúgvu, sum fyri kortum segði seg úr starvi, nú er sett aftur í sama starv.

– Eg kann bara vátta, at eg eri sett aftur í starv, sigur Kristina á Reynatúgvu við Sosialin.


Sosialurin
Nr. 171 • Mikudagur • 9. september 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00

sjúkrahúsinum
Síða 6-7

Arnbjørn byrjar inni
Síða 11

Kommunur eiga ikki at umsita skúlar
Síða 2

Skræddi 20 dunnur sundur
Síða 4

OFRAR SEG FYRI MANNIN